Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

Flogfelag Føroya og Atlantsflog skipa fyri
konsertferð til Keypmannahavnar
Live í Parkini:
Bruce Springsteen 14. juni
prísir úr 3.265,-
Rolling Stones 13. juli
prísir úr 2.990,-
Robbie Williams 25. juli
prísir úr 2.765,-
Nærri upplýsingar og bilegging á heimasíðu okkara:
www.flogfelag.fo ella tlf: 34 00 00
FLOGFELAG FØROYA
www.flogfelag.fo

Leita framvegis...

Enn stendur stólurin í bestu skrivstovuni í Fiskimálaráðnum tómur

Fólkaflokkurin hevur enn ikki funnið avloysaran til Jørgen Niclasen

STARV
Heri á Rógvi

Enn er eingin nýggjur fiskimálaráðharri funnin.

Sum vit skrivaðu fyrr í vikuni er áhugin alt annað enn lítil fyri starvinum. Fleiri valfeløg hjá Fólkaflokkinum hava kannað sær bitan, men skal ein trúgva almennu meldingunum, so er eingin avloysari funnin enn.

Óli Breckmann, formaður fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum, sigur, at tað verður tingbólkurin, landsstýrisumboðini og floksleiðslan, sum fara at taka avgerðina.

Floksleiðslan er mannað við tveimum umboðum úr hvørjum valdømi og tveimum umboðum frá Fólkafloks ungdómi.

Tað er løgmaður, sum setir og loysir landsstýrismenn úr starvi.

– Áhugin er vanliga stórur, og tað er hann eisini hesaferð, sigur Óli Breckmann.

Nógv hava seg ella onnur fram, og Fólkaflokkurin vantar ikki egnað fólk, metir Óli Breckmann.

Hóast leysasøgurnar hava verið nógvar, hevur tað ikki eydnast okkum at seta saman nakra lista yvir kanditatar. Óli Breckmann vildi ikki siga nakað um nøkur nøvn.

Áhugin sigast at vera stórur, og ikki minst í Suðuroynni banka tey hart upp á fyri at fáa umboðan.

– Suðuroyingar fáa møguleikan at koma við uppskotum sum øll onnur, sigur Óli Breckmann.

Sjálvur ætlar Óli Breckmann sær tó ikki í landsstýrið.

– Eg havi nóg mikið at gera við at vera formaður fyri tingbólkin og formaður fyri figgjarnevndina, sigur Óli Breckmann.

Tað verður ivaleyst meira at frætta um heita stólin í Fiskimálaráðnum í komandi viku.

Stráðfóðurið var stáplað ov høgt

Kanningar, sum donsku tøkningarnir hava gjørt, vísa, at tað helst er ein pera og ov høgt stáplað stráðfóður, sum hevur elvt til stóra eldin í bygninginum hjá MBM-fóður í Kollafirði

ELDSBRUNI
Ingrid Bjarnastein

Eldurin í MBM-fóður bygninginum í Kollafirði seinasta leygardag er helst komin av, at stráðfóður er stáplað ov høgt uppundir eina peru við nógvum hita

Mynd: Jens Kr. Vang

Fyrst í vikuni komu danskir tøkningar frá Kriminal Teknisku deild í Álborg og frá Danske Brand Institut til Føroya at kanna orsøkina til eldsbrunan í bygninginum hjá MBM fóður í Kollafirði fyri eini viku síðani.

Kanningarnir, sum tøkningarnir hava gjørt, eru nú lidnar og niðurstøðan er, at eldurin hevur helst fest í stráðfóður, sum hevur verið stáplað ov høgt uppundir eina loftsperu.

– Stráfóðurið er stáplað høgt uppundir eitt loftsljós við einum kupli. Talan er um eina stóra peru á 250 W, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini á Politigarðinum í Havn.

– Hetta hevur givið so nógvan hita frá sær, at tað hevur fest í. Tað hevur eisini verið tosað um ein møguligan feil í ljósinum. Hetta eru serligar perur, sum hava spola og kondisator, og tað skal nógv styrki fyri at tær tendra og áðrenn kyksilvurpulvurið kemur upp á tann hitan tað skal.

Donsku serfrøðingarnir eru nú farnir aftur til Danmarkar, og málið verður gjørt liðugt her í Føroyum.

Bergleif Brimvík, at talan er næstan um eitt hendiligt óhapp, tí slikt ger ongin við vilja.

Veðrið batnar

Hesa vikuna hevur veðrið verið ógvuliga keðiligt. Regn og vindur mestsum uttan íhald. Men Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur, at veðrið fer at batna í dag

VEÐURLAG
Ingrid Bjarnastein

– Grundin til, at veðrið hevur verið sum tað hevur er, at tað koma fleiri djúp lágtrýst yvir Føroyar, greiðir Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur frá.

– Men leygardagin skuldi tað farið at batna. Tá kemur hann av eystri og landnyrðingi. Hann fer at bliðka leygarnáttina, og so verður helst turt leygardagin.

Kulda kunnu vit framvegis vænta okkum, sjálvt um ikki hevur verið nógv at merkt til hann enn. Februar plagar at vera harður og kaldur, og ilt er at meta um, hvussu verður í ár.

Petur Skeel sigur, at hitin í november og desember mánað hevur ligið langt omanfyri miðal. Vanliga plagar tað at liggja um eini 4-5 hitastig, meðan í ár hevur tað verið um 6-7 hitastig, og tað er ógvuliga nógv.

– Alt árið hevur verið lýtt. Miðalhitin hevur ligið um 7,5 hitastig í mun til 6,6, sum tað plagar at vera. Orsøkin er so einfalt hon, at tað globalt gerst heitari. Ikki eins skjótt, men umleið eitt hálvt hitastig um árið.

Góða veðrið

Sjálvt um tað eftir øllum at dømi nú skuldi blivið turt aftur, so kunnu vit ikki vænta okkum liggjandi gott veður.

Sambært Petur Skeel, so verður tað liggjandi góða veðrið ikki at hóma fyrr enn í mei mánað.

– Mei mánaði plagar at vera ein sólríkur mánaði. Kanska ikki so heitur, men nógv sól.

So nú er bara at vita eftir, hvørt veðurfrøðingurin hevur rætt í sínum spádómum ella ikki.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur sigur, at tað hevur verið nógv heitari í Føroyum í vetur enn vanligt. Miðalhitin er farin tvey hitastig upp, og tað er ógvuliga nógv

Savnsmynd

ÚTSØLAN BYRJAR
MÁNAMORGUNIN 20. JANUAR KL. 9.00
VOGUE
M. Heinasonargøta 23 - Tlf. 312380
P/F hjá KISSA
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 85
Wrangler SHOP
N. Finsensgøta 23 Tel. 31 47 10